Heidegger valdi tann seinna vegin og gjørdist heimspekingur.

## At vera sær

Tvey høvuðshugtøk í heimspekini hjá Heidegger hava, beinleiðis ella óbeinleiðis, samband við skógin. Um tað fyrra brúkar heimspekingurin tað vakra týska orðið *Lichtung*, sum vit á føroyskum kunnu rópa "beri" ella "skóggrøni". Hann hugsar her um hesi víðilsini, tú kanst ganga teg fram á í einum skógi, har jørðin er vallað, við kanska einari tjørn, har tú brádliga sær ljós. Hetta er eitt bílæti av tí kenslu av opinbering, eitt mennniskja fær, tá ið tað sær ella tekkir, hvat tað er *at vera* – tað, sum Heidegger rópar Sein t.e. Veran.

Um hitt hugtakið brúkar meistarin tað týska orðið *Eigentlichkeit*. Ein kemur í hesum sambandi at hugsa um søguna "Einsamallur á Lítlu Dímun" eftir Heðin Brú, har Vørðumaðurin, nú hann er í einingi, lærir at "vera sær". At vera "eigentlich" er at vera sannur ella ektaður, vera tað heila og tilveruríka menniskjað, ein av røttum átti at verið. Tað stendur sum mótsetningur til tað at vera sum hini, sum fjøldin, tí tá er ein, sambært Heidegger, í roynd og veru *Niemand*, t.e. eingin.

## Afrodite

Í bókhandlinum Zum Wetzstein í Salzstrasse 31 í Freiburg er tað, sum ein kemur hesum merkiliga skógbúgva og hansara hugsan nærri. Bókhandilin er ikki stórur, men hevur eitt persónligt og úrlíka fínt úrval av bókmentum, ið fata um skaldskap, heimspeki og gudfrøði.

Handilsins miðdepil er Martin Heidegger, hvørs ritverk eigur heiðursplássið inni. Uttanum síggjast, kagandi fram, verk eftir m.a. Paul Celan, Friedrich Nietzsche, Robert Musil, Hannu Arendt, Edgar Allan Poe, Robert Bultmann, Karl Jaspers og Edmund Husserl, sum var undanmaður og lærumeistari hjá Heidegger. Inni í handlinum hoyrist alla tíðina undurvakur klassiskur tónleikur, og sum ein hyggur varliga at úrvalinum, kemur yvir ein eitt huglag av andakt.

Heystið hevur ikki enn sagt farvæl her suðuri og mitt um dagin er enn lýtt. Genturnar í Freiburg ganga berar, og slíkt samljóð og yndi er yvir teirra dimensjónum og formum, at tað kenst sum at ganga inni í eini høll, sum er halgað Afrodite. Men um ein nú kveitir at hinum kyninum, teimum monnum, sum fyrr ella seinni gerast sambúgvar ella menn hjá hesum lýsandi, mjáu ungmoyggjum, kann ein fyllast við sorgblídni. Hóast støðan ikki enn er sum vesturi í USA, so sær ein týðiliga tíðarinnar tekin – ta grefligu ovurfitina – gera vart við seg.

Ein fær hug at geva gamla Karli Marx rætt, kapitalurin fer avstað við øllum, eisini menniskjans heilsu og vakurleika. Ráðini burtur úr hesum óskili eru at ganga sína egnu leið, at vera sær ella velja *die Eigentlichkeit*. Hvussu mong okkara megna tað?

## Konstanz

Martin Heidegger royndi, sum teinkjari og menniskja, at stíga úr tíðini og inn í ævinleikan. So langt vági eg mær ikki, men miðøldin kann eisini brúkast. So ein dagin koyra vit suðureftir til ein bý, sum í dag er ókendur at kalla, men hvørs navn einaferð var á øllum kvøldlandsins varrum. Býurin eitur Konstanz og liggur við Bodenvatnið. At koyra úr Freiburg til Konstanz tekur hálvanannan tíma.

Okkurt merkiliga dragandi er við stórum innlandsvøtnum. So framkomin til henda lítla býin, hvørs lærdi háskúli er javngamal við okkara, spákar ein sær beinan vegin oman til Bodenvatnið. Sjógvurin er grønur, og hiðani sigla bátar í fastari rutu til m.a Friedrichshafen, Lindau og oynna Reichenau. Ikki langt frá havnini er tann áhugaverdi bókhandilin Osiander, innast í handlinum er ein lítil kaffistova, og haðani kann eina spáka sær út í ein lítlan urtagarð og sita har í sólini og lesa. Hvat um okkara Gamli Bókhandil, sum ræður yvir einum urtagarði, tók hetta hugskot upp?

Konstanz er søguliga áhuga-verdur av tveimum grundum. Tann sonevnda bábyloniska útlegdin, tá ið pávin hevði sítt setur í



*Martin Heidegger*



*Ravennagjógvin*

franska býnum Avignon, vardi sum kunnugt frá 1305 til 1378. Eftir hana kom eitt tíðarskeið við klandri og ruðuleika, og eina tíð vóru í teirri katólsku kirkjuni tríggir pávar í senn.

## Jan Hus

Fyri at koma hesum óskili, sum var út um alt mark mannminkandi fyri kirkjuna, til lívs, varð kallað saman til ein kirkjufund í Konstanz, sum varð hildin frá á heysti 1414 til apríl 1418. Tá búðu 6000 fólk í Konstanz, men sendimenninir á fundinum vóru 50.000. Teir valdu Martin Fimta til páva, og hann tók so við eftir tríggjar mótpávar.

Um hetta mundið fóru eisini aðrar rembingar gjøgnum tað kristna Europa. Tann kekkiski presturin Jan Hus, føddur í 1371, sum eisini virkaði á tí lærda háskúlanum í Prag, fanst at kirkjuni og førdi m.a. fram, at kirkjuligur myndugleiki bara var lýdni verdur, um kirkjunnar menn livdu eitt lív í rættlæti, og at frelsa ikki var nakað, ein kundi keypa.

Hus varð lýstur í bann av kirkjuni. Frá Sigismundi keisara hevði hann fingið loyvi til frítt at fara, og hann fór í treysti til hetta lyfti á kirkjufundin í Konstanz at verja sína trúgv. Hann varð handtikin, dømdur sum falslærari og biðin um at taka sína læru aftur. Hann sýtti fyri hesum og bleiv tann 6. juli 1415 brendur á báli á einum stað vestarlaga í býnum. Í Konstanz eru varðveitt bæði tað húsið, har Jan Hus búði ta tíðina, hann dvaldi í býnum, og, beint við bryggjuna, tey stóru keypmanshúsini, har kirkjufundurin varð hildin.

Hóast kirkjumenninir helst høvdu ta veruligu ábyrgdina av hesum sviki, skal Sigismundi ikki hava dámt at verður mintur á tað. Ógloymandi eru orðini hjá Karli Fimta keisara, tá ráðgevarar vildu hava hann at geva Luther, á fundinum í Worms í 1521, somu viðferð, sum Jan Hus fekk:

- *Eg vil ikki rodna sum Sigismund!*

## Inn aftur í tíðina

Jan Hus var ikki bara prestur og gudfrøðingur, hann var eisini rektari á lærda háskúlanum í Prag, var við til at skapa tað kekkiska skriftmálið og læt eftir seg verk á kekkiskum máli. Hann er tí í dag tann kekkiska tjóðarhetjan.

Á heimvegnum skipar okkara lítli GPS-stýrimaður soleiðis fyri, at vit koyra eftir hálvoynni norðan úr Konstanz og víðari gjøgnum býirnar Geisingen, Neustadt og Titisee móti Freiburg.

Og her, á tí seinasta strekkinum er Ravennagjógvin, eitt umráði við dølum, kluftum og gjáum, undurvakurt, stórbært og ørandi øðuligt at koyra ígjøgnum. Vit koyra eftir eini brúgv høgt uppi, rundan um okkum er berg við einum reiki av grannskógi ovast, longur niðri eru grasvaksnar brekkur, so er aftur berg, undir okkum koyra tok eftir smølum fjallavegnum, og niðri á botni streymar áin. Eitt panorama sum hetta tykist koma beint úr Ringanna Harra ella úr søguni "The Final Problem", har greitt verður frá, tá ið Sherlock Holmes og professarin Moriarty detta oman við fossin Reichenbach.

Men her, sum ein situr og droymir seg aftur til Gandálv, álvar og hobbar, kemur nútíðin og tekur í herðatoppin á einum. Á skeltum, sum eru fest í trø ella pelar, hyggja tíðarinnar hetjur móti einum, Angela Merkel, Frank-Walter Steinmeier, Westerwelle umframt eina ørgrynni av smærri og meira staðbundnum andum. Týskland ger seg til at fara á val. Kanska verður høvi til seinni at siga eitt sindur um tað.